# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 30.05.2016*

**Bygdaráðsfundur: 30.05.2016 kl. 17.00 til kl. 20.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 54/2016 Ognir og hølir**

J.nr. 82.01.00-G01-2-15

**Málslýsing**

Í januar mánaða 2016 viðgjørdi bygdaráðið møguligt keyp av ognini matr. nr. 429 Tofta bygd.

Nú fyriliggur ein avtala við avvarðandi um keyp av ognini matr. nr. 429 Tofta bygd. Kostnaður kr. 725.000,00, umframt tinglýsingarkostnað.

Peningur er ikki avsettur, og støða skal takast til fígging. Eisini skal støða takast til hvat gerast skal við húsini, tá kommunan hevur keypt tey.

**Tilmæli**

Á fundi 25.05.2016 mælir Fíggjarnevndin til, at keypið verður fíggjað við tøkum peningi.

Fíggjarnevdin mælir somuleiðis til, at húsini verða tikin niður skjótast gjørligt, og innheintað tilboð viðv. niðurtøku av húsinum.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 55/2016 Havnir og floghavnir**

J.nr. 08.14.00-Ø09-2-15

**Málslýsing**

Ársroknskapurin fyri 2015 hjá Kongshavnar havn er komin til ummælis hjá
Nes kommunu.

**Tilmæli**

Á fundi 25.05.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við roknskapinum
soleiðis, sum hann er uppsettur.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 56/2016 Bygningsreglugerð, grundstykki og reglugerðir**
J.nr. 02.34.02-P20-22-16
**Málslýsing**
Í skrivi 11.04.2016 søkir Bjarni Mohr, Tórshavn um loyvi at ogna sær lendi til grundstykki við Høganesveg, sum kommunan er í holt við at ogna sær.

**Tilmæli**
Á fundi 17.05.2016 mælir Tekniska nevnd til, at Bjarni Mohr kann ogna sær grundstykkið, sum nú hevur fingið matr. nr. 342 c.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 57/2016 Bygningsreglugerð, grundstykki og reglugerðir**
J.nr. 02.34.02-P20-21-16
**Málslýsing**
Í skrivi 11.04.2016 søkir Ari J. Ellingsgaard, Tórshavn um loyvi at ogna sær lendi til grundstykki. Stykkið, talan er um, er burtur av matr. nr. 383a Tofta bygd, við Høganesveg.

**Tilmæli**
Á fundi 17.05.2016 mælir Tekniska nevnd til, at kommunan ognar sær lendið at selja víðari til Ari J. Ellingsgaard.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Súni í Hjøllum var úti, meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 58/2016 Rakstrargøgn, innbúgv, keyp og viðlíkahald**
J.nr. 83.11.00-G01-1-15
**Málslýsing**
Brekkarin, til tað nýggju arbeiðsmaskinuna, er ov lítil, tann nýggja maskinan er størri enn tann gamla, og tí er neyðugt við einum nýggjum brekkara.

Nýggjur brekkari kann fáast fyri kr. 36.900,-. Tann gamla brekkarin verður latin inn fyri kr. 10.000,-.

**Tilmæli**
Á fundi 17.05.2016 mælir Tekniska nevnd til, at nýggjur brekkari verður keyptur.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 30.05.2016*

Á fundi 25.05.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av stovninum viðlíkahald av bilinum, rakstrargøgn.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 59/2016 Vegir og ferðsla**
J.nr. 05.01.16-P20-1-16
**Málslýsing**
Kommunan hevur hegnað 250 m, fram við Regnavegnum. Samlaður kostnaður fyri kommununa er kr. 43.800,-. Avsett til hegn fyri 2016 eru kr. 35.000,-.

Tekniska deild hevur ætlanir um at hegna 300 m afturat fram við Regnavegnum. Kostnaðurin hjá kommununi fyri 300 m er kr. 52.600,-.

Meirkostnaðurin fyri kommununa er kr. 61.400,-.

**Tilmæli**
Á fundi 17.05.2016 mælir Tekniska nevnd til at hegnað 300 m afturat fram við Regnavegnum.

Á fundi 25.05.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av stovninum hegn og bøgarðar.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 60/2016 Vegir og ferðsla**
**J.**nr. 05.09.00-P20-5-16
**Málslýsing**
Í skrivi, móttikið 09.05.2016, verður søkt um at fáa til keyps øki til privat parkeringsøki burtur av vendiplássinum fram við garðinum hjá umsøkjaranum.

**Tilmæli**
Á fundi 17.05.2016 mælir Tekniska nevnd frá at selja burtur av verandi vendiplássi. Kommunan hevur gjørt vendiplássi, sum er neyðugt í samband við tunga ferðslu, sum er eftir vegnum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 30.05.2016*

**Mál nr. 61/2016 Havnir og floghavnir**

J.nr. 08.03.00-G01-2-16

**Málslýsing**

Landingarmiðstøðin á Toftum hevur keypt bygningin á matr. nr. 435e, og hevur brúk fyri at leiga 131m² afturat verandi leiguøki.

**Tilmæli**

Á fundi 17.05.2016 mælir Tekniska nevnd til, at Landingarmiðstøðin á Toftum kann leiga 131m² afturat til matr. nr. 435 e.

Niclas Davidsen var úti, meðan málið var viðgjørt.

Á fundi 25.05.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**

Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

Niclas Davidsen var úti, meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 62/2016 Havnir og floghavnir**

J.nr. 08.03.00-G01-3-16

**Málslýsing**

Landingarmiðstøðin ynskir at fáa til leigu øki matr. nr. 435e, til víddar 1605 m ², herav 980 m² er ábygt øki og 625 m² er uttanumøki.

Økini verða at nýta sum grundstykki til virkisbygningin hjá Sp/f Landingarmiðstøðini á Toftum, og til tað virksemið, ið hevur samband við hetta.

**Tilmæli**

Á fundi 17.05.2016 mælir Tekniska nevnd til, at kommunan gera leigusáttmála við Landingarmiðstøðina á Toftum.

Niclas Davidsen var úti, meðan málið var viðgjørt

Á fundi 25.05.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**

Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

Niclas Davidsen var úti, meðan málið var viðgjørt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 30.05.2016*

**Mál nr. 63/2016 Ognir og hølir**

J.nr. 82.11.00-P20-1-15

**Málslýsing**

Í sambandi við arbeiðið av at gera túnið, omanfyri kommunuskrivstovuna, liðugt, fyriliggur ein vegleiðandi kostnaðarmeting.

**Tilmæli**

Á fundi 17.05.2016 mælir Tekniska nevnd til, at flísar og tilfar verður keypt, samlaður kostnaður fyri flísar og tilfar er kr. 29.500,-, og at fleiri tilboð verða innheintað uppá gelendaran.

Á fundi 25.05.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av stovninum ymiskt kommunufyrisiting.

**Avgerð**

Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini einmælt samtykt.

**Mál nr. 64/2016 Havnir og floghavnir**

J.nr. 08.03.30-P20-1-16

**Málslýsing**

Teknistovan í Gøtu hevur gjørt eina kostnaðarmeting av asfalteringsarbeiðinum oman fyri hallirnar og millum hallirnar, hjá Kassamiðstøðini og Falkon, og millum hallirnar hjá Kassamiðstøðini, Falkon og Saltsøluni, inni við Rætt. Kostnaðarmetingin fyriliggur.

**Tilmæli**

Á fundi 17.05.2016 mælir Tekniska nevnd til at asfalterað verður millum hallirnar, hjá Kassamiðstøðini og Falkon, og millum Kassamiðstøðina, Falkon og Saltsøluna, og at arbeiðið verður bjóðað út.

Á fundi 25.05.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og tá tilboðini fyriliggja, verða tey viðgjørd.

**Avgerð**

Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 65/2016 Vegir og ferðsla**

J.nr. 05.01.00-P20-1-16

**Málslýsing**

Tekniska deild hevur gjørt eina vegleiðandi kostnaðarmeting av asfalteringsarbeiðinum á Lýðarsvegi, har ein vegbreidd á 6,5 m verður asfalterað soleiðis, at pláss verður fyri kantsteini til gongubreyt. Arbeiðið av kantsteinum er ikki við í kostnaðarmetingini.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 30.05.2016*

**Tilmæli**
Á fundi  17.05.2016 mælir Tekniska nevnd til, at arbeiðið verður gjørt, og at arbeiðið verður bjóðað út.

Á fundi 25.05.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og tá tilboðini fyriliggja, verða tey viðgjørd.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.